## DAGSINS MEINING

# Eitt lítið mál — men eitt álvarsmál

Málið um skúlan á Trøllanesi er aftur eitt skúladømi um, at okkara politiska skipan virkar ikki nóg væl. Málið er eitt dømi um, at hvørki fyrisiting ella politikkari eru búgvin til størv síni. Málið vísir somuleiðis vantandi skúla- og undirvísingarpolitikk. Og málið er at enda eitt dømi um, at aðalstýrið — og kanska eisini politikkarar — virða ikki lógina um alment innlit.

Uttan at fara út í æsir, átti landsins skúlapolitikkur komið til sjóndar í, um vit hava skúlar í øllum bygdum ella ikki. Spurnartekin verður sett við, um tað er rætt, at ein kommuna ger av, um hon hevur skúla ella ikki. Vit kunnu hugsa okkum — eins og í Mikladals kommunu — eina kommunu við tveimum bygdum. Tann eina bygdin fær ongan lim valdan í bygdaráðið ella bara ein av fimm og er sostatt í minniluta. Skal so bygdaráðið einsamalt hava rættin til at leggja skúla niður ella ikki? Víst skal nærdemokratiið virðast, men í slíkum málum má ein landspolitikkur vera avgerandi.

Í málinum um skúlan á Trøllanesi visti eingin, at Mentamálastýrið hevði givið boð um, at skúli aftur skuldi vera á Trøllanesi. Tað kom fram, at fyrrverandi landsstýrismaðurin, Torbjørn Jacobsen, helst munnliga hevði lovað nesmonnum skúla aftur, tí nú vóru børnini so nógv í tali. Sum rætt er.

Men so kemur undan kavi, at arbeitt er í heimildarloyvi. Og øll — bæði fjølmiðlar og almenningurin — halda, at Torbjørn er farin út um heimildirnar. Núverandi landsstýrismaðurin er trekur at koma við viðmerkingum. Hann sigur bara í eini sjónvarpssamrøðu, at hann tekur undir við undangongumanninum, men tegir við, at hann hevur givið boðini!

Tíbetur høvdu Dimma og Útvarpið biðið um alment innlit. Hóast Mentamálastýrið ikki lat tað týðandi skrivið saman við eini rúgvu av skrivum, vóru Dimma og Útvarpið greið yvir, at eitt skjal vantaði. Hetta skjalið, sum hesir fjølmiðlar síðani fingu fatur í, avdúkaði, at tann tigandi landsstýrismaðurin sjálvur hevði givið boðini! Og hvat gjørdi landsstýrismaðurin í — haldið tykkum fast — mentamálum, tá hann varð tikin við undirbuksunum niðri. Nei, hann stóð ikki sum ein maður, men segði seg bara hava gjørt tað, sum undangongumaðurin hevði lovað...

Eitt lítið mál, men eitt álvarsmál. Ikki bara hjá fólkinum norðuri á Nesi, men sanniliga hjá Mentamálastýrinum og landsins stýri.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Arbeiðs og frítíðarlívið og gransking!

**Hans Birgir Hansen**

Tað er nógv at klára upp í tí dagliga arbeiðs- og frítíðarlívið fyri at kunna svara hvørjum sítt og fylgja øllum tí upp, ein hevur skrivað í túsundtals lesarabrøvum.

Tað er nógv ið liggur á láni, tá iðein er byrjaður nýggja lívstilveru/spildurnýggja heilsu/nýtt lív aftaná á arvastríði, tá ein hevur livað í meira enn hálvthundrað ár!

Tað er ikki smávegis ein hevur fingið fram í kjakinum tá in hugsar um skipa tjóðina og arbeiðandi fólkið!

Tað er ymiskar kreftir/-politiska skipanin/myndugleikar/valdir/fyritøkur/-stovnar/virkir ið skapa arbeiðandi fólki kreppur/-trupulleikar/tvørleikar kring landið!

Tað er neyðugt at fáa skipað búskaparliga/fíggjarliga/handils-/vinnuliga/-mentunarliga/sosiala javnvág úti í etableraðum lívsviðurskiftum/fjøltáttað virksemi!

Tað er nógvur peningur øll kunnu spara við at broyta sínar lívs/kost/-nýtsluvanar, ið skulu gerast nattúrligir, og øll skulu gevast at nýta skðiligan heilivág!

Tað er neyðugt at fáa fram í fólksins tilvitan hvønn týdning tað hevur at skifta skaðiligan heilivág út við natúrmedisin, ið kann fyribyrgja/lekja allar sjúkur!

Tað er neyðugt at beina øll reingarðar/upploysingarevnir burtur frá køkinum/matgerð til kjallaran so tit ikki innandan slík skaðilig evnir niður í tykkum!

Tað er hesi evnir ið seta gongd á bakteriur og virus í mannakroppinum, ið skapa deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur og natúrmedisin fæst til keyps í Havn!

Tað er dokumentatiónir eg havi frá bind I og II focus på virksomme naturmidler ein lesur og granskar og ein tekur natúrmedisin tá ein er heima!

Tað er spennandi/áhugavert at gera sínar egnu lívsroyndir, ein kemur at kunna fólk ið hava slíkar deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur, ið fólk dragast við!

P. S. Eg havi fingið nýggja kommunala íbúð.

# Føroysk konufólk ráðaríkar vandamiklar!

**Hans Birgir Hansen**

Tað eru allar ungar gentur/-kvinnur/bíligar/ið arbeiða við síðuna av fólkaskúlum/framhaldsdeildum/-studenta/handils/lærara/sjúkrasystra/tekniska skúla/-HF skeiðum!

Tað eru slíkar ungar gentur/kvinnur ið aftaná hjáarbeiðir leita sær úti náttar/rukkulívið/fyri at trekkja á hotellum/matstovum/ølklubbum/ og í havnargøtum!

Tað eru slíkar ráðaríkar/vandamiklar/ið kunnu geva løgreglumonnum ein slutur/slatur/tá tær fáa løgreglumenn at eyðmýkja ein í almennum eygum í Havnini!

Tað eru slíkar ið koma undir heiti bílig arbeiðsmegi, ið hjálpir arbeiðsgevarum/arbeiðstakarum at undirgrava fakfelagslógir/sáttmálabundnar lønir í Havnini.

Tað eru slíkar ið fáa skattafrían lestrarstuðul og við fríkorti tjena 15. til 17.000 kr. skattafrítt á hvørjum tí einasta ári og sleppa undan samfelagsskyldum!

Tað eru slíkar, ið hava greitt einum sínar hugsanir um skipað skøkjuhús/-skøkjulevnað/drukk/hor/hvørt vikuskifti/á summarstevnum/konsertum/veitslum!

Tað eru slíkar, ið við kropsligari nektan/eggja til siðloysi – fáa fremmandar dreingir/menn/føroyskar løgreglumenn at venda sær ímóti einum í Havnini!

Tað eru slíkar úti í privatum blaðkioskum/-kaffi/pylsuvognum/hotellir/matstovur/grillbarrir/ølklubbum, ið hava fingið tikið teir av ræði í Havnini!

Tað eru valdsharrar/-serfrøðingar/ið hava umskapað tær til livandi robottar tómar/innihaldsleysar mannaverður/-kenslu/samvitsku/ábyrgdarleysar!

Tað eru slíkar hvørs lívs/nýtsluvanar eru blivnar vanabrotsgferðir við at fremja brúksstuldur/rán!

P. S. Tær hava javnan melda ein.

# Foreldur um Trøllanesstríðið

Viðvíkjandi stríði um skúlan á Trøllanesi, vilja vit foreldur gera vart við at tað at børnini ikki eru møtt til skúlagongd í Mikladals skúla, einki hevur við avgerðina hjá Landsstýrismanninum at gera. So leingi avgerðin sá út til at vera í lagi, hildu vit okkum standa sterkari. Men nú er tað vátta av løgfrøðingi at landsstýrismaðurin ongar heimildir hevði, og tað hava vit tikið til eftirtektar. Eisini halda vit at Óli Holm hevur alment staðið fram og viðurkent tað. So tað sum vit vilja við hesum, er at vísa á at ljóskastarin er vendur skeivan veg. Trupulleikin liggur hjá Mikladals bygdarráð, sum hevur valdið á hesum øki. At kommunan og skulastýrið velja at ignorera ynski hjá Trøllanes bygd, halda vit vera vánaliga stýring, og tá vit vilja standa stinn og vísa á, at soleiðis eigur borgarin ikki at verða viðfarin í einum demokratiskum landi.

**Heilsan foreldrini at skúlabørnunum á Trøllanesi**


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


# ítróttur

Nr. 171 • hósdagur • 6. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Leikbann hóttir landsliðsleikarar



*Vónandi megna teir báðir, John Petersen og Jóhannis Joensen, at savna tankarnar um landsliðsuppgávurnar, heldur enn at hugsa um útvísingarnar móti ávíkavist FS Vágum og NSÍ*

**Á fundi ein av komandi døgunum fer kappingarnevndin hjá FSF at gera av, hvørt talan skal verða um fleiri daga leikbann til tveir av landsliðsleikarunum**

ÚTVÍSINGAR
*Jákup Mørk*

Hjá ávíkavist HB og B36 bíða tey í hesum døgum í spenningi eftir, hvørja avgerð kappingarnevndin hjá FSF fer at koma til, tá teir í næstum skulu viðgera tvær útvísingar.

Talan er um tey bæði reyðu kortini, sum John Petersen og Jóhannis Joensen fingu í dystunum móti ávíkavist FS Vágum og NSÍ.

Frágreiðingarnar fyri útvísingarnar eru ikki tøkar hjá almenninginum, men sum skilst á lagnum, so hava dómararnir í báðum førum mett brotini hjá leikarunum somikið álvarslig, at talan í ringasta føri kann gerast um fleiri daga leikbann til leikararnar.

### Ongar viðmerkingar

Bæði í B36 og HB vátta tey, at Fótbóltssambandið hevur biðið um viðmerkingar til hendingarnar, men felags fyri feløgini er eisini, at tey annars ikki hava hug til at gera nakrar serliga viðmerkingar.

- Vit kunnu vátta, at vit hava fingið skriv frá FSF viðvíkjandi hendingini, og vit hava eisini sent svarskriv inn, so málið kann verða viðgjørt av kappingarnevndini. Annars hava vit ongar viðmerkingar til málið, meðan hetta verður viðgjørt, er einsljóðandi svarið frá Kristian á Neystabø úr B36 og Steinfinni Mittelstein úr HB.

Sum skilst á lagnum fer kappingarnevndin at viðgera málini í komandi viku.

## Jákup fær íslendskan liðfelaga

**Íslendskur landsliðsáleyparin, Andri Sigþórsson, skrivaði í farnu viku undir sáttmála við Molde**

NOREG
*Jákup Mørk*

Seinastu tíðina hevur nakað av rumbli verið í Molde, har Jákup Mikkelsen hevur sáttmála fram til ársskiftið. Fíggjarligir trupulleikar og boð um sparingar hava viðført, at felagið hevur verið noytt at selja leikarar, og hetta er so avgjørt ikki nakað, sum hevur hóvað krevjandi áskoðarunum serliga væl.

### Evnaríkur leikari

Tað er tó ikki bara frágongd av leikarum, sum hevur verið á skránni hjá Jákupi og teimum hesa tíðina.

Fríggjadagin í farnu viku skrivaði íslendski landsliðsframherjin, Andri Sigþórsson, undir sáttmála við Molde, og tá hann kemur aftur úr Norðurírlandi eftir landsliðsuppgávuna har, fer leiðin til Molde, og ikki til Austria Salzburg, har hann annars hevur spælt.

Andri Sigþórsson hevur leingi verið mettur sum ein av evnaríkastu leikarunum í Íslandi, og longu sum 16 ára gamal varð hann sáttmálabundin at Bayern München. Her gjørdist talan um trý ár, sum ivaleyst hava givið stóran lærdóm, hóast talan ikki gjørdist um dystir á besta liðnum.

Afturkomin til Ísland spældi hann eitt skifti við barndómsfelagi sínum, KR Reykjavík, áðrenn hann í 2000 varð seldur til Salzburg.

Seinastu tíðina hevur Andri saman við Chelsea framherjanum, Eidur Gudjónsson, verið fastur maður í Íslendska álopinum, og millum annað stóðu teir báðir fyri hvør sínum máli, tá Ísland leygardagin skelkaði fótbóltseuropa við einum 3-1 sigri á Kekkia.

# Tveir sveisarar hava klamsað við hurðunum

**At spælarar eru misnøgdir, tí teir ikki verða valdir at vera millum teir fyrstu ellivu er kent kring allan fótbóltsheimin**

ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tveir kenningar hjá føroyska fótbóltslandsliðnum hava í vikuni verið umrøddir í altjóða fótbóltstíðindunum fyri nakað, sum ikki hevur beinleiðis við fótbóltsspælið at gera.

Talan er um tveir av sveisisku landsliðsspælarunum, sum vóru á liðnum, tá Sveis og Føroyar spældu HM undankappingardystir.

Verjuspælarin Stephane Henchoz úr Liverpool og veteran álopsmaðurin, Stephane Chapuisat úr Grasshoppers boðaðu báðir um vikuskiftið frá, at teir ikki longur vóru partur av sveisiska landsliðnum. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir vóru ikki við, tá Sveis mikukvøldið skuldi spæla ímóti Luksemborg.




*Saman við Stephané Chaupisat hevur Stephané Henchoz gjørt av at fara úr sveisisku venjingarleguni.*

Eftir 2–1 tapið á heimavølli ímóti Jugoslavia stungu báðir tveir í sekkin. Báðir vóru teir misnøgdir, tí tað leygardagin ikki var pláss fyri teimum millum teir fyrstu ellivu. Báðir søgdu teir seg góðtaka, at teir ikki vóru nóg góðir til besta liðið, og báðir søgdu teir seg vera firtnar inn á, at venjarin ikki hevði givið teimum boðini soleiðis, sum teir hildu seg hava rætt at fáa tey.

– Undan dystinum fekk eg einki at vita frá venjaranum, og tískil gekk eg út frá, at eg skuldi byrja inni, segði Stephane Henchoz fyrr í vikuni við eingilsku pressuna. Tá var vónbrotni maðurin komin aftur til Onglands.

– Tá landsliðsvenjarin, Kobi Kuhn, ikki kundi brúka meg ímóti Jugoslavia, so rokni eg heldur ikki við, at hann ætlar at brúka meg ímóti Luksemborg, segði Stephane Chapuisat, sum leygardagin varð skiftur inn, tá tað restaði eitt korter av dystinum ímóti Jugoslavia.